

KROSS RÐ GÁTA





Loysnin frá seinastu viku

Loysunarorðið: SOKRATES

Vinnari: Pauli í Jansagerði, á Kirkjubø, Miðvági

Hvønn leygardag
verður krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein av niðanfyri nevndu bókum frá Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í *seinasta lagi hósdagin*. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið »Krossorðagáta« á bjálvan.

Loysnunarorðið:

Navn

Bústaður


Bygd/býur

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

- ❑ **Fuglar í Norðurhøvum**
- ❑ **Stjórnarskipanarmálið 1946**
- ❑ **Spell at sólin kom upp**
- ❑ **Politiska søga Føroya 1814–1906**
- ❑ **Føroyskir soppar**
- ❑ **Døgurðabókin**
- ❑ **Søgan um eplið**
- ❑ **Heimsatlas**
- ❑ **Mannakroppurin – og hvussu hann starvar**
- ❑ **Alfagurt ljóðar mín tunga (fløga/ljóðband)**

Bøkur og annað tilfar
– bæði innan og uttan skúlagátt.

FØRÐYA SKÚLABÓKAGRUNNUR



Sáðið

Lagt til rættis: Oddbjørg Poulsen



Hin góði Samverjin

Jesus fekk ofta spurningar um mangt og hvat.

Ein spurdi Jesus: – Hvønn skal eg vera góður við?

Jesus fór tá at siga frá teirri søguni, sum er um hin góða Samverjan.

Øll møgulig, sum áttu at hjálpt einum manni, sum lá særdur við vegin, gingu bert framvið uttan at hjálpa honum, men so kom samverjin og hann fór og hjálpti honum.

Nú var maðurin, sum spurdi Jesus, ikki longur í iva: – Jú, eg haldi at ein eigur at vera sum hasin maðurin.

Ein eigur at elska øll – og hjálpa har, ein kann.

Tað er tað, Jesus lærir okkum við hesi søgu.